**Skála Ítróttarfelag**
**Stovna 13.05.1892**
**FO-480 Skáli**
**Tlf. 441574/Fax 441574**
**Formaður:** Kurt Rasmussen

**Meistarar:** Ongantíð – Besta úrslit nr. 8 í 1. deild
**Steypavinnarar:** Ongantíð
**Greipuvinnarar:** Ongantíð
**Í 1. Deild (2 ár):** 2002-
**Í Europa:** Ongantíð

# Tey standa saman

**Í ítróttinum er samhaldsfestið á vestara armi á Skálafjørðinum sera gott, ikki minst tá ið tað snýr seg um at manna og stuðla fótbóltsliðnum**

Jóannes Hansen

Tað hevur ikki altíð ljóðað frá, at tær báðu stóru bygdirnar á vestara armi á Skálafjørðinum hava drigið eina línu. Men í ítróttinum bilar ikki. Í hondbóltinum fylkjast menn og kvinnur um St.Í.F., og í fótbóltinum er tað Skála Ítróttarfelag. Báðar bygdirnar eiga kapp-róðrarbátar, og tað kemur ofta fyri, at tær hjálpa hvørjari aðrari at manna bátarnar.

Á besta fótbóltsliðnum eru spælarar bæði av Strondum og Skála á liðnum, og so hava teir fleiri útlendingar at hjálpa til.

Skála Ítróttarfelag er ikki gamalt í fremstu røð í mannfólkafótbólti. Í fjør var fyrsta árið, at teir royndu seg í 1. deild. Í fyrra árið endaðu teir næstfremstir í 2. deild. Teir spældu tveir dystir um plássið í bestu deildini ímóti B71, sum endaði næstaftast í 1. deild. Kanska var tað eitt sindur óvæntað fyri allar partar, at tað var Skála, sum endaði omaná og harvið flutti upp.

Í fjør var setningurin at varðveita plássið í bestu deildini, og tað eydnaðist. At Skála ikki ætlaði at leggja rygg til stórtap omaná stórtap fekst greið ábending um í bólkaumfarinum í steypakappinginі, tá ið Skála vann á KÍ bæði á heimavølli og í Klaksvík.

Í ár vóru fyrstu umførini í steypakappingini ikki so sannførandi. Men í Gundadali ímóti B36 tapti Skála bara 2-1, og tað sást, at heldur ikki í ár er tað óhugsandi, at Skála onkra ferðina fer at arga tey stóru. Í fjør megnaði Skála í landskappingi ni javnleik á heimavølli bæði ímóti B36 og KÍ.

Ofta verður sagt, at annað árið í 1. deild er tað torførasta, og tað eru tað fleiri føroysk feløg, sum kunnu skriva undir uppá. Í fyrstu royndini er íblásturin stórur. At vera ærukærur og hugburðurin at vísa, at uppflytingin ikki bara var eitt eiti, ber stig og sigrar við sær. Takið er so at manna seg uppaftur, eftir at hetta hevur eydnast eina ferð. Tað hevur ikki altíð verið so lætt.

Fyritreytirnar hjá Skála at standa seg eins væl í ár, sum teir megnaðu í fjør, kundu havt verið betri. Orsøkin er tann, at teir hava mist helmingin av spælarunum, sum vóru á liðnum í fjør. Rumensku spælararnar vildu teir ikki hava aftur, og avbygdaspælararnir, sum hjálptu teimum í fjør, eru allir farnir í onnur feløg.

Nú royna teir á Skála við fleiri ungum spælarum og nýggjum útlendingum. Johan Nielsen er nýggjur venjari, og Pauli Poulsen, sum hevur verið í miðverjuni í fleiri ár, er hjálparvenjari.



*Skála hevur mist helmingin av spælarunum, sum vóru á liðnum í fjør. Nú royna teir seg við fleiri ungum spælarum og nýggjum útlendingum.*

Mynd: Álvur Haraldsen

## Leikarahópur

Tølini, sum eru viðmerkt, siga, hvussu nógvar dystir/mál leikarin spældi/gjørdi fyri felagið í 2002, og hvussu nógv (gul-reyð) kort leikarin hevur fingið í sama tíðarskeiði.

| Navn | Í fjør | Landsdystir | Áður spælt við |
|---|---|---|---|
| **Málverjar** | | | |
| Heini Kristiansen | 2/-3 (0-0) | | |
| Eugen Voda (RUM) | 16/-30 (1-1) | | |
| **Verja** | | | |
| Agnar Højgaard | | | B36 |
| Kaysten Rasmussen | 2/0 (1-0) | | |
| Ronni Hansen | | | |
| Julian Florescu (RUM) | | | B71, B36 |
| Tummas Olsen | 7/0 (0-0) | | |
| Jaic Dusan (JUG) | | | |
| **Miðvølllur** | | | |
| Bárður Danielsen | 5/0 (0-0) | | |
| Rói Jacobsen | | | |
| Juveic Aleksandar (JUG) | | | |
| Pauli G. Hansen | 11/2 (0-0) | | |
| Bárður Joensen | | | |
| Hanus Thorleifsson | 8/1 (0-0) | | |
| Bogi Gregersen | 8/0 (0-0) | | |
| **Álop** | | | |
| Arnhold Berg | 16/1 (3-0) | | |
| Alexandur Johansen | 15/3 (1-0) | | |
| Jónhard Frederiksberg | | | |

| Navn | Í fjør | |
|---|---|---|
| **Frágongd** | | |
| Áki Petersen | 17/1 (1-0) | ÍF |
| Rúni Rasmussen | 16/0 (1-1) | NSÍ |
| Pauli Poulsen | 16/0 (2-0) | Givin |
| Bent Djurhuus | 15/0 (2-0) | Givin |
| Marius Joensen | 12/2 82-0) | Givin |
| Dánial Hansen | 12/1 (0-0) | B68 |
| Alexandru Gabor (RUM) | 10/4 (2-0) | Rumenia |
| Gheorghe Callo (RUM) | 9/0 (4-0) | Rumenia |
| Leivur Justinussen | 1/-6 | Givin |
| Jákup Petur Eliasen | 1/0 (0-0) | Givin |
| Magni Thomsen | 1/0 (0-0) | Givin |
| **Tilgongd** | | |
| Jaic Dusan (JUG) | | Jugoslavia |
| Juveic Aleksandar (JUG) | | Jugoslavia |
| Agnar Højgaard | | Byrjaður aftur |
| Bárður Joensen | | Skála |
| Rói Jacobsen | | Skála |
| Julian Florescu (RUM) | 13/1 (1-1) | B36 |
| **Venjarar** | | |
| Johan Nielsen | | |
| Pauli Poulsen, *hjálparvenjari* | | |



# Meiri enn helmingurin av Skála liðnum er burtur

**Pauli Poulsen, sum hevur verið miðverji og nú er hjálparvenjari, ásannar, at avbjóðingin aftur í ár verður at spæla fyri lívinum í bestu deildini**

Jóannes Hansen

Teir hava nýggjan venjara á Skála. Talan er um mest roynda venjaran í landinum. Eftir nógvu árini í Gøtu, er Johan Nielsen fluttur út um Eiðið og yvir um fjørðin. Hann arbeiðir við at seta skikk á besta fótbóltsliðið á Skála. Úrslitini í venjingardystunum og bólkaumfarinum í steypakappingini hava ikki verið nakað at reypa av. Men tað hevur ikki so stóran týdning hjá skálamonnum. Teir rokna ikki við, at teir skulu koma í nánd av finaluni á Ólavsøku og steypasigrinum.

– Tað snýr seg í fyrstu syftu um at skava so mikið av stigum saman, at vit sleppa undan niðurflyting. Tað var málið í fjør, og tað eydnaðist. Um tað fer at eydnast í ár, fer tíðin at vísa, men eg rokni við, at kappingin verður í minsta lagi eins torfør, sum hon var í fjør. Tá vunnu vit lykladystin ímóti TB, og vit vunnu eisini ímóti B68 og EB/Streymi. TB er ikki longur í bestu deildini. EB/Streymur tykist vera væl fyri, og í FS Vágum, sum flutti upp í fjør, verður sagd, at teir ætla sær meiri enn niðurflyting.

Tað er Pauli Poulsen, sum vit tosa við. Hann hevur árini frammanundan verið miðverji á 1. liðnum hjá Skála. Nú er hann hjálparvenjari:

– Eg hevði ætlað mær at brúka minni tíð upp á fótbóltin í ár, enn eg havi gjørt undanfarnu árini. Men nú eri eg hjálparvenjari hjá nýggja venjaranum, og tað man vera minni munur á tíðini, sum t.d. í fjør fór til fótbóltin, og tíðini, sum nú verður nýtt til fótbóltin, heldur Pauli Poulsen.

### Stórt mannfall

Sammett við teir, sum vóru á liðnum, tá ið Skála síðsta fjórðingin av kappingini í fjør stóð seg so mikið væl, at teir lyftu sær av aftasta plássinum, sum teir so leingi høvdu verið á, og upp á áttanda plássið og harvið burtur frá bæði beinleiðis niðurflytingini og endaumfarinum um at sleppa undan niðurflyting, so er liðið nógv broytt.

– Í fjør vóru vit alt í alt 24, sum vóru á besta liðnum. Av hesum eru trettan ikki longur í felagnum. Onkrir hava gjørt av bara at spæla hondbólt og ikki fótbólt, onkrir eru farnir av landinum, onkrir eru givnir, og onkrir eru farnir í onnur feløg. Vit høvdu tveir rumenar á liðnum. Vit vónaðu, at teir fóru at verða førir fyri at lyfta liðnum. Tað er eingin meining í at hava fremmandar spælarar, um teir ikki eru betri enn lokalu spælararnir. Tað vóru rumenarnir ikki. Tí bóðu vit teir ikki aftur. Í staðin hava vit í ár fingið tveir jugoslavar, og higartil hava vit verið stak væl nøgdir við teir, sigur Pauli Poulsen.

Hjá fleiri av føroysku spælarunum, sum í fjør vóru á Skála, og sum nú eru farnir aðra staðni, hevur tað verið lætt at fylgt orsøkini til, at teir eru fluttir. Kári Nielsen, sum er av Sandi, býr í Havnini og spælir nú í HB. Rúni Rasmussen er úr Runavík og spælir aftur við NSÍ, og Dánial Hansen býr á Glyvrum og arbeiðir á Toftum og spælir við B68. Áki Petersen, sum í fjør var í Skála miðverjuni og arbeiðir á Skála, hevur valt aftur at fara til Fuglafirðar at spæla. Hann er fuglfirðingur og fer nú at spæla í 2. deild.

Umframt jugoslavarnar hevur Skála fingið Julian Floresco, sum í fleiri ár var á Sandi og í fjør spældi við B36. Eugen Voda er framvegis á Skála. Men Johan Nielsen hevur tikið unglingamálverjan Heina Kristiansen, sum fram ímóti kappingarenda í fjør spældi tveir dystir á besta liðnum, framum. Agnar Højgaard, sum í síni tíð fór av Skála og til GÍ, og sum ikki hevur spælt í fleiri ár, er aftur farin at venja við besta liðnum á Skála.

Tá ið vit tosaðu við Paula Poulsen, arbeiddu teir við at fáa onkrar útlendingar afturat at hjálpa sær. Men Pauli vildi ikki vera meiri ítøkiligur, tí, sum hann tók til, tað hevur so ofta verið tætt við hjá so nógvum, tá ið tað ræður um at fáa útlendskar spælarar henda vegin, men heilt víst er tað ikki, fyrrenn teir eru á liðnum.

### Unglingarnir bjóða av

Hóast tað er tepurt við fólki, og hóast teir á Skála hava kent seg noyddar at fara aðra staðni eftir spælarum, so tykist áhugin fyri fótbólti millum teir yngru framvegis at vera góður. Hetta sæst aftur í, at Skála luttekur í unglingakappingini.

– Men so skal leggjast afturat, at stuðlarnir á unglingaliðnum eisini eru á liðnum í 1. deild. Teir spæla harvið nógvar dystir, men tað hevur altíð dámt unglingum væl. Vit halda, at tað er sera týdningarmikið at geva teimum, sum eru í unglingaaldri møguleikan at spæla, og tá ið fleiri 1. deildarspælarar eru við á liðnum, so fer tað neyvan at ganga heilt illa, heldur Pauli Poulsen. Unglingaspælararnar, sum hann sipar til, eru m.a. málverjin Heini Kristiansen, Bárður Joensen og Rói Jacobsen.



*– Eg hevði ætlað mær at brúka minni tíð upp á fótbóltin í ár, enn eg havi gjørt undanfarnu árini. Men nú eri eg hjálparvenjari hjá nýggja venjaranum, og tað man vera minni munur á tíðini, sum t.d. í fjør fór til fótbóltin, og tíðini, sum nú verður nýtt til fótbóltin, heldur Pauli Poulsen.*

Mynd: Álvur Haraldsen